gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Løgna framferðin

Nú er ikki nóg mikið hjá Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins at taka sær definitiónsrættin til, hvat er rættvísi, hvat er partapolitikkur og hvat er tann einasti rætti politikkurin. Nú hevur hann eisini tikið sær definitiónsrætt til, hvat er einasti rætti journalistikkurin. Hóast ein av hansara egnu nú fleiri ferðir hevur sagt alment, at formaður hansara helt ikki orð, tá nýggjur landsstýrismaður skuldi setast, so velur formaður Tjóðveldisflokksins ikki at svara hesi ótrúliga avdúkandi skuldseting men setir seg sum dómara og fellur dóm yvir blaðið, sum endurgevur tingmannin Signar á Brúnni og prentar hansara egnu orð. Tað er ikki Signar, sum lýgur, men tað er Sosialurin, sum ger tað. Nakað soleiðis skal henda propaganda skiljast. Er hetta ikki manipulatión av grovasta slag!

Løgið at eitt blað skal verða lastað fyri at endurgeva orðini hjá einum av mest royndu politikarunum í Føroyum. Er tað skeivt at endurgeva ein politikara, ið hevur verið formaður í Tjóðveldisflokkinum í fleiri ár og hevur verið landstýrismaður í nógvum landstýrissamgongum? Ein politikari sum í skørpum mótsetningi til ávísar av floksfeløgum sínum, ikki hevur logið alment ella hevur slongt ivasom prosenttøl út um allar geilar, og tí ikki hevur nakran trúverdigheitstrupulleika.

Um Høgni Hoydal meinar, at Signar á Brúnni lýgur, so eigur hann at siga tað, uttan at brúka Sosialin sum skjótiskivu. Tað ger Høgni Hoydal ikki, og hóast hann gjørdi tað, so kundi hettar í besta fall snúð seg um orð móti orði.

Hugburðurin aftanfyri skrivingina hjá varaløgmanni er ikki sørt óhugnaligur. Tað verður lagt upp til, at ein fjølmiðil ikki skal ditta sær at endurgeva ein av mest royndu politikarunum í Føroyum uttan at spyrja floksformannin hjá viðkomandi eftir. Nú skulu ikki takast dagar ímillum, hvørjar royndir varaløgmaður hevur á journalistiska økinum ella fyri tað politiskar royndir, men løgin sær skriving hansara út.

Kanska er tað júst erfaringin, ið ger munin. Tað sigur seg sjálvt, at í politikki hava orðini hjá einum manni við drúgvum royndum meira vekt enn orðini hjá einum politiskum dilletanti - fyri bert at taka eitt dømi úr tómari luft. Eitt sunt søguligt baksýni við medábyrgd og fjølbroytnari uppfatan er meira trúverdugt enn eitt søguligt baksýni, ið einki gott hevur ímilllum 1948 og 1998. Ein floksleiðsla, sum kastar alla ábyrgd frá sær viðvíkjandi 80'unum og letur sum um – og tíverri er vandi fyri at ungdómurin ikki veit betur – at 80'ini høvdu einki við teirra flokk at gera, hóast teir sótu í samgongu og høvdu fíggjarmál um hendi størsta partin av umtalaðu 80'um, er ikki trúverdug.

Trúverdigheit gerst ikki størri av einari broytnari søguuppfatan, sum nú eftir øllum at døma eisini fæst við at revidera søgu upp á stutt sikt. Um alt viðvíkjandi Signar á Brúnni er farið fram eftir bókini, so lysti okkum at sæð ta bókina, ið ikki kann verða annað enn ótespiligur lesnaður. Løgna Hoydal útsagnið í blaðnum í vikuni er ikki uttan áhuga, tí at loypa á ein fjølmiðil, bert tí hann endurgevur Signar á Brúnni og prentar viðmerkingar frá honum, er heilt burturvið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bjarni Djurholm og Postverk Føroya

**Heini O. Heinesen**
*formaður í Vinnunevnd løgtingsins*



Tá ið landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, í Útvarpi Føroya gevur Vinnunevnd Løgtingsins ábyrgdina av gongdini í málinum um Postverk Føroya, er hetta ikki annað enn at skulka sær undan teirri ábyrgd, hann hevur sum landsstýrismaður á økinum.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið frá landsstýrismanninum um postvirksemi bæði væl og virðiliga. Hetta kunnu allir nevndarlimirnir vátta. Men tað er einki at taka seg aftur í, at uppskot landsstýrimansins als ikki var ófullfíggjað. Og Bjarni eigur at minnast til, at tað kann vera vandamikið at kasta við gróti, tá ein sjálvur býr í glashúsi!

Tað, sum vinnunevndin broytti í uppskotinum hjá landsstýrismanninum, var at lata tann partin av verandi lóg, sum umhandlaði Postverk Føroya, vera standandi – og ikki fara úr gildi, sum skotið varð upp av landsstýrismanninum. Talan er her um greinirnar 1-6. Henda broyting av uppskoti landsstýrismansins hevði ført við sær, at Postverk Føroya ikki bleiv avtikið sum stovnur. Nevndin var so gott sum samd um hesa broyting, og tá ið landsstýrismaðurin varð kunnaður um hetta, segði hann, at broytingin var neyðug.

**Til Bjarna ella postverkstjóran?**

Tað kundi verið áhugavert at vitað, hvussu tað hevði gingið hjá landsstýrismanninum at komið við einum fíggjarnevndarskjali/eykajáttan til at játta meira pening til postverkið, sum eftir hansara egna uppskoti varð avtikið sum stovnur. Hvønn skuldi peningurin tá verið játtaður til, Bjarna Djurholm, landsstýrismann ella postverksstjóran?

Hetta vísir bara, hvussu lítið skil landsstýrismaðurin hevur fyri tí, hann skjýtir upp.

Tað, sum var orsøkin til, at málið ikki kom aftur úr vinnunevndini, var, at hansara egnu nevndarlimir úr Fólkaflokkinum ikki kundu semjast um, hvørji posthús skuldu vera standandi í lógini. Uppskotið hjá landsstýrismanninum gekk út uppá, at einki posthús skuldi verða nevnt í lógini. Í verandi lóg eru øll posthúsini nevnd. Okkurt er hóast alt avtikið kortini.

Tá ið landsstýrismaðurin nú roynir at føra sín egna kleyvarskap yvir á vinnunevnd løgtingsins, er hetta fullkomiliga burtur við. Hann átti heldur at farið at leitað inni í sínum egna flokki, hvat teir í veruleikanum vilja. Vil Fólkaflokkurin avtaka landspostboðini til fyrimuns fyri privatar fyritøkur ella einstaklingar, t.d. Shell- og Statoil-støðir, handilsmenn ella onkrar aðrar?

**Samd vinnunevnd**

Verandi vinnunevnd hevur gjørt eitt gott og seriøst arbeiði. T.d. kunnu vit nevna, at ein samd nevnd kom aftur í løgtingið við lógaruppskotinum um Strandfaraskip Landsins. Tað sama var við uppskotinum um barsilsskipanina; har fekst eisini full semja. Eg haldi ikki, at hetta er vánaligt nevndararbeiði, tí hesi bæði uppskotini vóru líka ófullfíggjað, sum tað um Postverk Føroya, tá ið tað kom frá landsstýrismanninum Bjarna Djurholm.

Men her royndi eg sum formaður í vinnunevndini at fáa sum frægast burtur úr tí, sum skotið varð upp. Tað merkir tó ikki neyðturviliga, at hetta var einasta rætta loysnin, men hetta var tað frægasta, sum vit kundu fáa burtur úr tí sum fyrilá.

Landsstýrismaðurin hevur als onga grund til at skjóta ábyrgdina av sínum egna kleyvarskapi yvir á vinnunevndina og yvir á fólkið á gólvinum hjá Postverki Føroya!

Tað kann eingin ivi vera um, at vit skulu hava Postverk Føroya. Tjóðveldisflokkurin hevur ongantíð havt nakað ímoti at játta neyðuga peningin til tess. Tí kundi eg hugsað mær at spurt landsstýrismannin í vinnumálum: Hvar í hansara egna lógaruppskoti finst nakað, sum kann skapa tann neyðturviliga raksturin, so Postverk Føroya kann halda fram?

**Post Danmark sum dømi**

Taka vit Post Danmark sum dømi, so fáa teir millum 450-500 milj. krónur í stuðli úr ríkiskssanum um árið fyri at dekka útjaðaran. Hetta svarar til einar 5-6 milj. kr. um árið eftir føroyskum viðurskiftum.

Tað, sum kanska hevur skapt teir størstu trupulleikarnar hjá postverkinum, er kongstankin hjá ávísum flokkum í undanfarnum samgongum um, at eingin peningur skuldi setast á fíggjarlógini í fleiri ár. Úrslitið er eitt eftirsleip upp á 50 milj. krónur, sum henda samgongan hevur arvað frá undanfarnum samgongum.

At postvirksemið ikki er nøkur góð forrætning í hesum teldutíðum, má standa hvørjum politikara greitt. Haraftrat at verða niðurpínt fíggjarliga, ger, at postverkið hevur koyrt upp á stumparnar í mong ár. Hetta er ivaleyst størsti trupulleikin hjá postverkinum. Tað er eingin ivi í Tjóðveldisflokkinum um, at vit skulu hava eitt postverk, sum røkkur alt landið og sum eisini skal kunna klára seg í kappingini. Hetta er sjálvandi treytað av, at landskassain sum dekkar tær útreiðslur, sum standast av at røkka útjaðaranum. Okkara land er soleiðis háttað, at tað er tann størri parturin av Føroyum, sum kemur undir heitið »útjaðari« – um vit samanbera við økið hjá Post Danmark.

Tá ið Bjarni Djurholm nú roynir at vaska sínar hendur í hesum máli er tað bara ein smartur máti hjá honum í eini roynd at gera sg sjálvan til eitt »unikum« sum landsstýrismaður!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Danskt mistreysti

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrismaður*



Stutt viðmerking til orðini hjá danska fólkatingsliminum Sonju Mikkelsen.

Leygardagin 9. juni visti Útvarp Føroya at siga frá danska fólkatingsliminum Sonja Mikkelsen, at hon stúrdi fyri, at minking í blokkstuðlinum og yvirtøka av málsøki á føroyskar hendur kundi føra til tænastulækking.

Viðmerkingin frá danska fólkatingsliminum hongur saman við, at landsstýrið hevur avgjørt, at skúlamál og almen forsorg skulu yvirtakast fyrstkomandi ársskifti.

Landsstýrismaðurin í mentamálum Torbjørn Jacobsen hevur í fjølmiðlunum víst á, at hendan viðmerkingin er heilt burturvið, tá vit hava umsitið skúlamál í fleiri ár, og talan bert er um ein formalitet at yvirtaka ábyrgdina av skúlaverkinum.

Tað sama er galdandi á almannaøkinum, tá fyrisitingin av málsøkinum "offentlig forsorg" hevur verið á føroyskum hondum síðani 1975.

At júst hesi bæði økini nú koma undir føroyskt ræði hongur saman við, at hetta eru málsøki sum kunnu yvirtakast bert við at fráboða hetta til donsku stjórnina.

At hesin háttur er valdur eigur ikki at undra nakran, tá tað hevur víst seg at vera ógjørligt at koma nakran veg á sjálvbjargningsleið við samráðingum við donsku stjórnina.

Hesin møguleikin at yvirtaka uttan samráðingar er staðfestur í Heimastýrislógini og er uttan iva einasti møguleiki vit hava, so leingi eingin samráðingarandi er at hóma frá tí einu síðuni.

Tað kann tó undra, at man er villigur til at ganga so langt, at man frá danskari síðu vil niðurgera okkum í so stóran mun sum fólk, at tað skal vera ein sjálvfylgja at tænastu-støði skal lækka um vit, eftir at hava ivirtikið fyrisitingina, eisini ivirtaka ábyrgdina.

Eisini hava royndirnar víst okkum, at eingin trygd er í tí, at ábyrgdin av undirvísing og forsorg liggur í donskum hondum.

Vit sum trúgva uppá einar Føroyar eftir føroyskum fortreytum, hvar ábyrgdin liggur í okkara hondum, trúgva uppá eitt betri skúlaverk og eina betri forsorg.

# Sama ger, hatta er bert Suðuroy og suðuroyingarnir

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Hetta er niðurlagi hjá verandi samgongu.

Vit sum búgva í Suðuroy kunnu ikki koma til aðra niðurstøðu enn, at samgongan heldur at Suðuroy og tey sum búgva har ikki skulu hava somu rættinde, sum aðrir borgarar í hesum landið, sum eitur Føroyar.

Nýggj ferja skal byggjast til suðuroyarleiðina, men tað sær út til at samgongan dregur máli út og tað kann bert verða við tí eina endamáliðnum, sum er at spara uppá eina íløgu sum skal halda í 30 ár.

Verandi mannagongd vísur, at samgongan leggur vertin í um samferðslan til suðuroy er nøktandi.

At so er, síggja vit við at Strandfaraskip Landsins ikki fær játtan til eina nøktandi samferðslu til Suðuroy, títtleikin er ov lítil og vit sum búgva her suðri merkja tað við, at gjalda kr. 300,- fyri eina koyggju í 2 tímar, skúlaítróttardagur fyri fleiri hundrað børn mátti avlýsast tí játtanin til SL er ov lítil, ferðaætlanin frá Tórshavn er tíðin ikki hildin tí yvirtíð skal sparast, bilar skøvast og klæðir hjá ferðafólki dálkast tí plássi umborð er ov lítið, og so framvegis.

Framløga skuldi verða fyri almenninginum í Suðuroy av nýggju ferjuni, men hendan framløga bleiv útskotin vegna forfall? Eg meini tað.

Berghol skuldi gerast millum Øravík og Hov , 4 mill. eru avsettar á verandi fíggjarlóg, men landstýrismaðurin sigur nú, at verkaætlanin skal útsetast og tað hevur eisini verði ætlanin alla tíðina, tí tað er einki avsett til berghol á fíggjarætlanini fyri 2002.

At kanningarnar av Leirvíksfirði skulu framskundast er heilt íordan, men skulu vit her suðrið bert sita hendur í favn og góðtaka, at vit og oyggja okkara blíva viðfarin sum ein blindtarmur, í bert er til fortreð hjá samgonguni og blíva viðfarin sum annanklassa borgarar av samgonguni?

Til trygging av Norðskálatunlinum er avsett 4 mill í 2001 og 6 mill í 2002, men at reinsa loftið í Hvalbiartunlini fyri nakrar kneysar sum taka í, tá ið stórir lastbilar koyra ígjøgnum kann ikki gerast.

Bert hesu fáu mál vísa, at suðuroyggin er koyrd út á eitt síðuspor av verandi samgongu og at teir ikki hava viljan til, at Suðuroyggin og tey sum búgva her, koma upp á sama støði sum restin av Føroyum.

# Løgtingsval í heyst ?

**Lisbeth L. Petersen,**
*Sambandsflokkurin*



Tá harðast hevur leikað á í samgonguni, og løgtingsval tyktist vera einasta loysnin, hava formennirnir í størstu samgonguflokkunum lagt dent á, at samgongan fór ikki til val áðrenn tíðin var úti.

Men nú sær út til, at eisini har er okkurt hent, skulu vit trúgva tí, sum nýggi landsstýrismaðurin við mentamálum sigur,. Hesin er tann, sum skal bjarga Tjóðveldisflokkinum burtur úr tí trúvirðistrupulleika, sum flokkurin hevur í sambandi við hin eina nógv umrødda og umstrídda landsstýrissessin. "Løgtingsval verður í allar seinasta lagi um minni enn eitt ár. Kanska verður val longu í heyst" sigur Óli Holm m.a. í viðtalu við fjølmiðlarnar.

**Nóg mikið at tríva í**

Ongin ivi er um, at ríkiligt er at tríva í hjá nýggja landsstýrismanninum fyri at fáa skil á teim trupulleikum, sum nú gerast alt meira og meira sjónligir.

Floksformaðurin proklamerar annars, er henda samgongan hevur betrað vælferðarskipanirnar á øllum økjum, samstundis sum meginparturin av blokkstuðulinum er settur til viks á bók, men um nakar trýr honum, skal ikki vera sagt her við vissu. Sambandsfólk gera tað so ikki !

Rópt vera neyðarróp úr øllum ættum, ikki minst á skúlaøkinum, tí játtanirnar røkka ikki. Er tað prógvið um betraða vælferð, samstundis sum tað verður reypað um, hvussu nógvur peningur streymar inn í landskassan ?

**Fíggjarlógin 2002**

Nú nýggi landsstýrismaðurin nevnir val longu í heyst er orsøkin helst tann, at nú fíggjarlógaruppskotið fyri 2002 eftir øllum at døma verður tilevnað, er ósemja millum samgonguflokkarnar, tí hvussu skal alt hanga saman, bæði lyfti og fíggjarmøguleikar?

Viðvíkjandi teim 3-400 milliónunum, sum undir øllum umstøðum skuldu skerast burtur komandi fíggjarár samb. løgmanni, so tók fyrra landsstýrisumboðið við almanna- og heilsumálum undir við honum, men boðaði eisini frá, at á almanna- og heilsuøkinum skuldi ikki skerjast.

Tá so samstundis gr. 8 í fíggjarlógini, ið er til almanna-, heilsu- og íbúðarmál, er umleið helvtin av fíggjarlógini tilsamans sum nú er, og skúlamálini hava alt ov tepra játtan, hvar skal so sparast ?

Ei undur í at trupulleikarnir hópa seg upp.

Tí er væl hugsandi at nýggi landsstýrismaðurin hevur sagt tað, sum hinir enn ikki hava torað at sagt, nevniliga at løgtingsval helst verður longu í heyst, og tað eru so ikki ringastu boðini at fáa !

# Tæna kundanum best

TÍÐINDARSKRIV

*Rasmus Magnussen*
*El & Tele*

Fyrsta fyritøka innan teletøkni, ið hevur tikið kappingina upp á økinum við telefon-vekslarum, og sum heildarveitari á el – edv – & telekervisloysnum.

Líka síðan Rasmus Magnussen og Eyðun Egholm slóu træðrirnar saman, og El & Tele sá dagsins ljós, hava teir lagt seg eftir at vera tann førandi tænastuveitarin innan el-edv- og telekervi.

Tað er ein sannroynd, at teknologiska menningin gongur so skjótt, at ilt er hjá vanligum fólki at fylgja við. Bert at vita hvat fyritøkan ella einstaklingurin hevur tørv á ella hvat hard-ware, soft-ware, instalatión, net, linjur o.s.fr. kann vera ein frumskógur at fara ígjøgnum. Og úrslitið er so at siga tað altíð tað sama. Ein hópur av veitarum, sum skylda upp á hvønn annan og eingin kann veruliga hjálpa, tá ið á stendur.

Hesum hevur El & Tele sett sær fyri at sleppa sínum kundum undan. Hjá El & Tele fært tú alt á einum stað, og tú hevur bert ein veitara at venda sær til, um trupulleikar skuldi stungið seg upp. Á hendan hátt kann kundin eisini fáa eina holla, og góða ráðgeving. Á tann hátt verður tú tryggjaður, at ikki óneyðugar íløgur verða gjørdar ella óneyðug orka verður nýtt.

Eitt av lyklaorðunum hjá El & Tele er professonalisma. Hetta merkir fyri starvsfólkini, útbúgving og áhaldandi víðari útbúgving og jøvn dagføring við luttøku á skeiðum, seminarum og messum.

Á tekniska økinum merkir professionalisma góðska. Góðska á tilfari og góðska á arbeiðnum, sum gjørt verður og efturlit við bestu útger, sum finst á marknaðinum.

Í einum setningi kann sigast, at El & Tele saman við kundanum ger loysnir, sum tæna kundanum best.

At El & Tele eru við í fremstu røð sæst eisini við at teir, sum Ascom-umboð í Føroyum, hava veitt tað fyrstu IP-telefoniloysnina frá Ascom Nordic.

IP-telefoni tøknin ger tað møguligt at samskifta á sama hátt, sum teldur gerða. Ìðstaðin fyri at senda data pakkar í millum teldur verða datapakkar við talu sendar millum telefonirnar*

Tá Heilsufrøðiliga Starvsstovan flutti í leigaði hølir í Tórshavn, var tørvur á samskifti stovnana millum. El & Tele gjørdi teimum eina loysn, við einum vekslara á hvørjum stað, sum samskifti um eitt tráðleyst samband við IP-tøkni, tískil eru allar samrøður teirra millum ókeypis. Vanligur data-flutningur fer eisini um tráðleysa sambandi. Eitt annað sum ger loysnina sermerkta er, at bert tráðleysar telefonir verða brúktar. Tær kunnu sjálvandi brúkast á báðum støðum, um tørvur er fyri tí.

Hendan loysnin hevur vakt ans hjá heimskenda blaðnum PC World, og vilja teir skriva eina grein um loysnina, í einum av komandi útgávum.